# Inngangur



Í ólavsøkurøðu síni í 2005 segði løgmaður soleiðis:

»Føroyar standa á einum vegamóti. Hetta krevur, at stórar politiskar avgerðir verða tiknar. Tað eru avgerðirnar, vit taka *nú*, sum skulu vísa, um vit megna at tillaga okkum treytirnar í einum alheimsgjørdum búskapi.

Visjónin er, at Føroyar í 2015 verða millum bestu lond at virka og liva í. Vit ynskja, at Føroyar skulu verða samfelag við sterkum búskapi, har arbeiði er til allar hendur, og har dygdargóðar sosialar skipanir tryggja øllum eitt virðiligt lív. Skulu vit røkka hesum máli, er neyðugt við greiðum og framsóknum ætlanum.«

Tað var í hesum anda, at Landsstýrið setti sjøtul á arbeiðið Visjón 2015.

## Mál og Vegir

Bókin »Mál og Vegir« er úrslitið av arbeiðinum hjá bólkunum, ið hava orðað uppskot til mál og strategiir fyri 13 ymisk øki í okkara samfelagi. Bólkarnir hava sett upp aðalmál fyri hvørt øki, nevnt grundarsteinur, og greiða frá, hvørji stig eru neyðug fyri at røkka málunum.

Ein kapittul er fyri hvønn grundarsteinin:
Alheimsgerð, Útbúgving, Gransking, Íverksetan, Kunningartøkni, Tilfeingi, Samfelagsbygnaður, Infrakervi, Umhvørvi, Mentan, Arbeiðsmarknaður, Vælferð og Sjálvstýri.

**Soleiðis lesur tú bókina**

Kapitlarnir kunnu lesast óheftir hvør av øðrum. Á baksíðuni kanst tú lesa, hvussu arbeiðið við Visjón 2015 hevur verið skipað.

Samandrátturin er ein mynd, sum vísir, hvussu strategibólkarnir ímynda sær, at Føroyar síggja út í 2015, um teirra uppskot til mál og strategiir verða fylgd.

Umframt hesa bók er ymiskt tilfar frá arbeiðinum við Visjón 2015 savnað á heimasíðuni www.2015.fo

**Góðan lesihug!**